LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 1. juli 2021
J.Nr.: LUM-16- 21/01532-17
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

# Álit

viðvíkjandi klagu um avgerð hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum at nokta stuðli til eina filmsverkætlan

Við skrivi, dagfest 30. november 2020, hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "…
>
> Klagen
>
> Jeg vil gerne klage over Kultuminister B omstødelse af Filmsgrunsins indstilling til filmstøtte til projektet 'Skula Scam'.
>
> Sagens årsag
>
> I september i år (2020) søgte undertegnede Filmsgrunnurin om støtte til filminstruktør ... og manuskriptforfatter ..., med det formål at skrive tv-serien 'Skúla Scam' om til en spillefilm.
> Konsulenterne i Filmsgrunnurin indstillede 'Skúla Scam' til at modtage 40.000 til formålet. Kulturminister B gik derefter imod sine egne eksperters indstilling, og modsatte sig uddelingen af støtten til Skúla Scam "vegna málbrúkið í filminum." (Se venligst afslaget vedlagt.)
>
> Argumentation
>
> Det er således Kulturministerens indgriben i Filmsgrunsins forretningsorden der klages over. Jeg påstår ikke at Kulturministeren ikke kan gøre det. Jeg påstår at ministerens handlemåde strider mod den intention Filmsgrunnurin blev skabt med af Løgtinget.
>
> Filmsgrunnurin er, på trods af navnet, ikke en egentlig fond, men blot en post på Kulturministeriets budget. Dette gør, så vidt jeg forstår, at ministeren har beslutningskompetance over effektueringen af Filmsgrunsins støttetildelinger.
>
> Min påstand er at Filmsgrunnurin blev skabt for at støtte produktionen af Færøsk film. Og at Filmsgrunnurin blev konstrueret over en model man kender fra andre filmfonde i Skandinavien; med et udvalg af filmkonsulenter der indstiller filmprojekter til støtte, og med en tilsynsførene bestyrelse.
> Og min påstand er derfor at intentionen med Filmsgrunnurin var at lave en filmstøtte-ordning med samme professionelle kompetance og politiske uafhængighed som tilsvarende filmfonde i sammenlignelige lande. At konstruktionen ikke blev en fond i dette tilfælde, men blot en post på kulturbudgettet, har mere at gøre med de praktiske muligheder man havde i beslutningsøjeblikket.
>
> Jeg påstår også at filmcensuren er afskaffet på Færøerne, og at det derfor ikke er lovligt at fratage folk rettigheder i forbindelse med filmstøtte, grundet den pågældende films indhold, medmindre indholdet er direkte ulovligt.
>
> Jeg påstår også at 'grimt sprog' allerede er en accepteret del af kulturudbuddet til børn på Færøerne. Man kan således låne tegneserierne med Tintin på Býarbókasavnið i Havn, og købe bøgerne hos f.eks.

Myndlist i Niels Finsens Gøta, og der læse kaptajn Haddock bande og svovle så det får 'Skula Scam' til at blegne.

Yderligere oplysninger
Hensynet til det færøske sprog har været meget vigtigt for hele holdet under produktionen af Skula Scam. Efter at vi havde optaget stemmerne, og ... havde animeret 50 minutter af filmen, blev vi gjort opmærksom på at der var en del syntax fejl i sproget. Vi fik derefter nogle sprogkyndige til at rette alle manuskripter igennem, fik alle skuespillerne ind i studiet igen og genoptog stemmerne, og rettede animationen i alle de berørte scener. Det var et kæmpe arbejde. Men det siger noget om hvor meget vi faktisk har gjort for at beskytte Føroyskt Mál i filmen.
…"

## Málsgongd

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 4. desember 2020, varð klagan send Uttanríkis - og mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 4 vikur. Samstundis varð Uttanríkis – og mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 8. januar 2021 sendi Uttanríkis- og mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

**"Viðv. klagu frá A, dagfest 30. november 2020**

...
1. september 2020 varð umsókn móttikin frá A um stuðul til film. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevði frammanundan, í juli, lýst stuðulin við umsóknarfreist 1. septembur 2020. Tilsamans 30 umsóknir komu. Mannagongdin hjá aðalráðnum er at senda umsóknir, ið lúka formligu krøvini, til tveir filmsráðgevar, ið verða valdir fyri tvey ár í senn, at viðgera og gera tilmæli um hesar umsóknir. Tilmælini skulu verða grundgivin, bæði tá talan er um játtandi og noktandi svar.

Ráðgevarnir sendu 20. oktober 2020 12 tilmæli og 18 frámæli til aðalráðið. Tilmælini vórðu 23. oktober 2020 saman við uppriti send landsstýrismanninum, har mælt varð til at fylgja til- og frámælum.

Landsstýrismaðurin valdi at fylgja øllum tilmælum uttan einum, nevniliga tilmælinum um at stuðla verkætlanini Skúla Scam, t.e. málið, ið kært verður um. Hann boðaði umsitingini frá hesum í telduposti tann 2. november 2020, og samskift varð innanhýsis um, at umsøkjari mátti fáa játtandi tilmælið frá ráðgevunum saman við einum grundgivnum svari frá ráðnum.

4. november 2020 var fyrispurningur sendur Námi, hvørt stovnurin metti, um málbrúkið í filminum kundi verið góðkent, um talan hevði verið um undirvísingartilfar. Svarið var, at tilfarið helst ikki hevði kunnað staðið einsamalt, men at tað hevði kunnað inngingið í ein samanhang.

Svarið frá landsstýrismanninum varð sent umsøkjara 26. november 2020.

**Um filmsstuðulsskipanina hjá Uttanríkis- mentamálaráðnum**

Táverandi Mentamálaráðið fekk í 2014 eina serstaka stuðulsskipan til film, har endamálið er at menna og styðja spírandi filmsumhvørvið í Føroyum.

Einstaklingar, bólkar og feløg kunnu søkja um stuðul til ymsar tættir innan filmsgerð, harundir søgu- og hugskotsmenning.

Til at viðgera umsóknir um stuðul til film setir Uttanríkis- og mentamálaráðið tveir filmsráðgevar, sum ein stýrisbólkur velur, at gera tilmæli til landsstýrismannin um býtið av stuðlinum. Ráðgevarnir sita í tvey ár í senn. Ráðgevarnir skulu hava viðkomandi fakligar royndir og ikki hava fíggjarlig áhugamál í umsóknunum.

Ein stýrisbólkur er settur at hava yvirskipaða arbeiðið um hendur at skipa leistin fyri, hvussu almennur stuðul verður veittur til føroyska filmsgerð. Talan kann vera um stuðul til fyrireikingararbeiði, handrit, undanframleiðslu, framleiðslu, eftirarbeiði og útbreiðslu. Stýrisbólkurin hevur ikki atgongd til filmsumsóknirnar, men fær til- og frámælini frá ráðgevunum til kunningar í sambandi við, at ráðgevarnir eftirfylgjandi kunna stýrisbólkin um, hvussu einstaka stuðulsumfarið hevur verið. Endamálið er at fylgja við rákinum og um neyðugt at gera ábøtur ella broytingar í mannagongdum, eitt nú umsóknarblaðnum við tilhoyrandi vegleiðing.

Stýrisbólkurin skal gjøgnum sítt virksemi miða ímóti at nøra filmsumhvørvið í Føroyum og at stuðla útbreiðslu uttanlands, virka til, at ein filmsvinna kemur at virka í Føroyum og at tryggja, at játtanin til film verður býtt út eftir endamálinum við játtanini.

Í stýrisbólkinum eru umboð fyri Uttanríkis- og mentamálaráðið, Felagið Føroysk Filmsfólk, Filmshúsið, Klippfisk, LISA, Norðurlandahúsið, Kringvarpið, Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Vinnuhúsið.

Skipanin við filmsstuðli er fakliga tryggjað við ráðgevum, men leikluturin hjá ráðgevunum er tilmælandi. T.e. at armslongd ikki eyðmerkir skipanina. Tilmæli verða løgd fyri landsstýrismannin, ið tekur endaliga avgerð.
...”

Frá 8. mars 2021 til 21. apríl 2021 samskifti umboðsmaðurin við Uttanríkis- og mentamálaráðið um ymsar ivaspurningar í sambandi við omanfyristandandi frágreiðing frá ráðnum. Tað, ið greiða fekst á í sambandi við hesar ivaspurningar, er innarbeitt í niðurstøðuna í tann mun tað kemur málinum við.

**Niðurstøða**
Hendan klagan snýr seg um avgerð hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum at nokta stuðli til eina filmsverkætlan.

Stuðul til filmsverkætlanir er heimilaður í § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m.

Heimildin at stuðla filmsverkætlanum varð sett í lógina við broyting, ið varð gjørd í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014.

*Heimildin hjá landsstýrismanninum*
Í almennu viðmerkingunum til løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m. á síðu 3 stendur:

> ”…
> Lógin er ein heimildarlóg og gevur sostatt landsstýrismanninum innihaldsligu heimildirnar at játta stuðul av teim stuðulskontum, ið eru til mentan og list undir málsøkinum Mentan á løgtingsfíggjarlógini tó undantikið stuðul til bygging. ...”

Heimildin hjá landsstýrismanninum at gera av hvør, ið fær stuðul til film er ásett í § 2, stk. 2 í lógini, ið er soljóðandi:

> “...
> *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ger av, hvør kann fáa stuðul, og hevur somuleiðis eftirlit við, at stuðulin verður nýttur til ætlað endamál.
> ...”

Við broytingini í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014 varð filmur lagdur aftrat teimum endamálum, sum landsstýrismaðurin hevur heimild at lata stuðul til av teimum játtanum, ið hann hevur til taks á løgtingsfíggjarlógini. Sambært almennu viðmerkingunum til lógina tryggjar broytingin, at neyðugt lógargrundarlag fyriliggur, áðrenn játtan til stuðul til film kann verða nýtt.

Við broytingini í løgtingslóg nr. 45 frá 15. mai 2014 varð eisini ásett í § 1, stk. 4 og § 2, stk. 4, at landsstýrismaðurin, í kunngerð kann leggja heimildir sínar at lata stuðul og gera av hvør, ið fær stuðul til annan almennan myndugleika ella stovn.

Í serligu viðmerkingunum til § 1, stk. 4 og § 2, stk. 4 sæst, at Mentanargrunnur Landsins verður lýstur sum dømi um almennan myndugleika, ið heimildin kann leggjast til. Hóast hvørki almennu ella serligu viðmerkingarnar til lógina siga frá orsøkini til, at § 1, stk. 4 og § 2, stk. 4 eru settar í lógina, so verður eftir øllum at døma sipað til meginregluna um armslongd. Hóast hugtakið armslongd ikki hevur eina eintýdda allýsing, so er hugsanin handan meginregluna, at tað eigur at vera ein skilnaður millum politisku avgerðargongdina og skipan av yvirskipaðum kørmum øðrumegin, og tillutan av stuðli og útbreiðslu av mentanarligum virksemi hinumegin.

Vísandi til omanfyristandandi eri eg av tí fatan, at Løgtingið við lógarbroytingini í 2014 hevur tikið eina støðu til meginregluna um armslongd innan mentanarøkið og hevur í hesum høpi gjørt av at lata tað upp í hendurnar á avvarandi landsstýri at gera av, um ella í hvønn mun meginreglan skal vera galdandi.

Tá staðfestast kann, at heimildin í § 1, stk. 4 og § 2, stk. 4 ikki enn er nýtt, hevur landsstýrismaðurin rætt sjálvur at gera av hvør, ið fær stuðul.

*Avgerðin hjá landsstýrismanninum*

Hóast tað er landsstýrismaðurin, ið ger av hvør ið fær stuðul, so skal avgerðin hjá landsstýrismanninum verða innanfyri lógligu karmarnar, ið settir verða einari avgerð í hesum sambandi.

Hetta merkir, at avgerðin, umframt at hava heimild í lóg ella kunngerð, eisini skal lúka vanligu fyrisitingarrættarligu krøvini, ið sett verða einari avgerð í hesum høpi, m.a. kravið um sakliga fyrisiting og skylduna at lýsa eitt mál (da. officialprincippet). Skyldan at lýsa eitt mál merkir í stuttum, at ein myndugleiki hevur ábyrgd fyri, at eitt mál verður nóg mikið lýst, áðrenn myndugleikin tekur eina avgerð. Skyldan er ein grundleggjandi meginregla í fyrisitingarrættinum.

Í § 2, stk. 3 í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m. er soljóðandi kunngerðarheimild, ið hongur neyvt saman við avgerðarheimildini hjá landsstýrismanninum í § 2, stk. 2.

> “...
> *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, nær og hvussu stuðul verður játtaður, herundir krav um fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og um møguliga afturrindan av stuðli.
> ...”

Við m.a. heimild í omanfyrinevndu kunngerðarheimild, er kunngerð nr. 90 frá 28. oktober 2008 um stuðul til mentan og list sett í gildi.

§ 3, stk. 1 og 2 í hesari kunngerð, ið snýr seg um umsóknir um stuðul, er soljóðandi:

> **“§ 3.** Tá umsóknir um stuðul verða viðgjørdar, verða listarlig og mentanarlig eyðkenni at galda sum metingarstøði.
> *Stk. 2.* Mentamálaráðið kann útvega sær hjálp frá serkønum innan viðkomandi mentanar- ella listaøki, sum søkt verður um stuðul til.”

§ 3, stk. 1 í omanfyrinevndu kunngerð, setur lógliga karmin fyri hvat landsstýrismaðurin sakliga kann leggja dent á, tá hann skal meta um umsóknir um stuðul.

§ 3, stk. 2 í omanfyrinevndu kunngerð, gevur landsstýrismanninum heimild at útvega sær hjálp at viðgera umsóknir um stuðul. Ásetingin sampakkar eftir mínum tykki við tað, ið rúmast kann í skylduni at lýsa eitt mál.

Útvegaða hjálpin sambært § 3, stk. 2 verður sambært ráðnum nevnd "filmsráðgevar" og er sambært ráðnum ment sum ein føst skipan, ið á hvørjum ári tekur støðu til umsóknir um stuðul til film og ger tilmæli til landsstýrismannin um hetta.

Uttanríkis- og mentamálaráðið upplýsti tann 22. mars 2021, at karmurin og innihaldið av virkseminum hjá filmsráðgevunum er skipað í innanhýsis leiðreglum og vegleiðing hjá ráðnum. Í hesum er eitt nú ásett hvat ið ráðgevarnir skulu grunda sínar metingar á í sambandi við tilmæli til landsstýrismannin, og greitt verður frá um teir ymisku metingartættirnar, ið ráðgevarnir kunnu leggja dent á innanfyri ásetta karmin.

Umsóknin um stuðul frá klagaranum varð viðgjørd sambært § 3, stk. 2 í omanfyrinevndu kunngerð, og góvu filmsráðgevarnir eitt tilmæli til landsstýrismannin at taka støðu til.

Tilmælið frá filmsráðgevunum er soljóðandi:

> "...
> **Meting av verkætlanini**
> Skúla Scam er ein annarleiðis, slóðbrótandi, animerað røð til yngra ungdómin. Øll, ið hava verið við til at framleiða sendirøðina, hava starvast ókeypis, men meta ráðgevarnir, at filmsgrunnurin heilt víst skal stuðla hesi verkætlanini, og 17 ára gamla skaparanum av henni, víðari á síni ferð. Ráðgevarnir eru ikki í iva um, at ætlanin handan hesa verkætlanina gerst veruleiki.
>
> **Niðurstøða um stuðul**
> Mælt verður til at stuðla verkætlanini við kr. 40.000,-
> ..."

Galdandi er, at eitt tilmæli frá filmsráðgevunum ikki er at meta sum ein fyrisitingarrættarlig avgerð. Galdandi er eisini, at eitt tilmæli í hesum sambandi ikki er bindandi fyri landsstýrismannin. Skal eitt tilmæli verða bindandi fyri landsstýrismannin, krevst heimild fyri hesum í lóg ella kunngerð.

Tá eitt tilmæli ikki er bindandi fyri landsstýrismannin, er eitt tilmæli í sjálvum sær at meta sum eitt grundað íkast frá serkønari hjálp, ið fremur lýsing av málinum og stuðlar undir støðutakanina hjá landsstýrismanninum í málum um stuðulsveiting.

Í skrivi til klagaran, dagfest 23. november 2020, hevur landsstýrismaðurin grundgivið soleiðis fyri at havna umsóknini frá klagaranum um stuðul:

> "...
> Sagt verður frá, at umsókn tygara ikki verður gingin á møti. Sagt verður eisini frá, at ráðgevarnir hava mælt til at ganga umsóknini á møti, men landsstýrismaðurin metir seg ikki kunna viðmæla stuðli vegna málbrúkið í filminum.
> ..."

Umboðsmaðurin spurdi Uttanríkis- og mentamálaráðið um málbrúk er ein partur av teimum listarligu og mentanarligu eyðkennunum í § 3, stk. 1 í omanfyrinevndu kunngerð. Til hetta svaraði Uttanríkis- og mentamálaráðið tann 22. mars 2021 soleiðis: "Málbrúk verður ikki nevnt sum eitt beinleiðis eyðkenni, men málið er kraftmikil listabúni og hevur tí ein eyðsýndan týdning í einhvørjari miðling".

Hóast § 3, stk. 1 í omanfyrinevndu kunngerð ikki hevur eina nærri nágreining av metingarstøðinum, so eru ymiskir tættir í omanfyrinevndu innanhýsis leiðreglum og vegleiðing, ið nágreina metingarstøðið og hvat, ið kann vera ein partur av listarligu og mentanarligu eyðkennunum. Tó er hendan nágreining ikki ein nágreining, ið til fulnar ger greitt hvat, ið kann ella skal vera galdandi. Ei heldur er nøkur raðfesting gjørd eftir týdningi av metingarstøðinum, soleiðis at summir tættir hava størri raðfesting enn aðrir.

Hóast málbrúk ikki verður nevnt sum eitt beinleiðis eyðkenni, so kann eg vísandi til omanfyristandandi lýsing av metingarstøðinum ikki finnast at svarinum frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Grunda á hettar, meti eg meg heldur ikki hava grundarlag fyri at finnast at, at landsstýrismaðurin hevur lagt dent á málbrúk sum listarligt og mentanarligt eyðkenni fram um onnur, og raðfest hetta at hava avgerandi týdning.

Samanumtikið haldi eg, at landsstýrismaðurin, vísandi til § 3, stk. 1 og 2 í omanfyrinevndu kunngerð, hevur hildið seg innanfyri lógliga karmin fyri hvat landsstýrismaðurin sakliga kann leggja dent á og hevur mett um viðurskiftini kring málið á einum upplýstum grundarlagi.

*Filmsstuðulsskipanin*

Sum nevnt omanfyri er karmurin og innihaldi av virkseminum hjá filmsráðgevunum m.a. skipað í innanhýsis leiðreglum "Leiðreglur fyri umsiting av filmsjáttanini".

Talan er um leiðreglur, ið seta krøv og treytir til umsøkjarar bæði viðvíkjandi freistum í sambandi við latan av roknskapi og í sambandi við játtan av stuðli. Eisini skipa leiðreglurnar fyri hvussu nógv ár filmsráðgevarar kunnu sita á rað og hvussu teir verða løntir.

Eg eri eg av tí fatan, at leiðreglu formurin ikki er egnaður, tá talan er um reglur, ið skulu handhevjast móti borgarum og um reglur, ið skipa setanarlig viðurskifti hjá myndugleikanum.

Eg fari tí at mæla til, at Uttanríkis- og mentamálaráðið tekur stig til at skipa hesi og møguliga onnur viðurskifti, ið hava samband við umsiting av filmsjáttanini, í lóg ella kunngerð, soleiðis at opinleiki og gjøgnumskygni verður tryggjað á økinum.

Í frágreiðingini frá Uttanríkis- og mentamálaraðnum omanfyri sæst, at ein stýrisbólkur er settur at hava yvirskipaða arbeiðið um hendur at skipa leistin fyri, hvussu almennur stuðul verður veittur til føroyska filmsgerð. Sum eg av ráðnum eri gjørd kunnug við, er hesin stýrisbólkur skipaður í einari starvsskipan, ið m.a. skipar hvørjar uppgávur stýrið hevur, hvussu nógvar limir stýrið hevur, hvussu stýrislimirnir verða valdir og hvat endamálið við stýrisbólkinum er.

Tað er ikki óvanligt, at stýri, nevndir og ráð eru skipaði í starvsskipanum. Nevnast kann starvsskipan fyri stýrið fyri Fróðskaparsetri Føroya í § 11, stk. 5 í løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, starvsskipan fyri Dáturáðið í § 66, stk. 4 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum og starvsskipan fyri stýrið fyri Trygdargrunn Fiskivinnunar í § 4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 132 frá 28. desember 2010 um Trygdargrunn Fiskivinnunnar.

Felags fyri omanfyrinevndu dømi er, at starvsskipan er heimilað sum partur av áseting, ið skipar sjálvt grundarlagi undir viðkomandi stýri, nevnd ella ráði, eitt nú endamálsorðing og viðurskifti kring val og tal av limum.

Vísandi til omanfyristandandi og við atliti at opinleika og gjøgnumskygni, fari eg at mæla Uttanríkis- og mentamálaráðnum til, at ráðið fær skipað grundleggjandi viðurskifti kring stýrisbólkin í lóg ella kunngerð. Virðislønarnevndin, ið ásett er í § 6 í kunngerð nr. 90 frá 28. oktober 2008 um stuðul til mentan og list, kann vera fyridømi í hesum høpi.

Burtursæð frá omanfyristandandi viðmerkingum, geri eg ikki meira við málið.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður